# Leitanin eftir landsstýrismanninum

**Bæði Suðuroyar Fólkafloksfelag og Eysturoyar Fólkafloksfelag eru áhugaði at fáa ein landsstýrismann frá teirra valdømi í sessin sum fiskimálaráðharra, men enn frættist ikki so nógv um kanditatar**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Áhugi er fyri heita stólinum, har Jørgen Niclasen seinastu fýra árini hevur sitið.

So skjótt prátið um Jørgen Niclasen eisini fór at snúgva seg um, at hann skuldi fara frá, so byrjaðu eisini gitingarnar og leysasøgurnar um, hvør eftirfylgjarin skal vera.

Hetta prátið er nokk ikki heilt uttan upphav, tí áhugin er til staðar.

Í skrivandi stund hevur Fólkaflokkurin í tingbólkinum og í floksleiðsluni ikki viðgjørt henda spurning, sambært Anfinn Kallsberg.

Inntil víðari umsitur løgmaður málsøki. Spurningurin er so bara, hvussu leingi løgmaður eisini er fiskimálaráðharri.

Leitanin eftir triðja landsstýrismanninum hjá Fólkaflokkinum er byrjað.

Fólkaflokkurin hevur sjey tingmenn. Síggja vit burtur frá Jørgen Niclasen, so kann komandi landsstýrismaðurin gerast ein av hinum seks tingmonnunum. Eingin teirra hevur nakrar royndir sum landsstýrismaður. Ínnan fiskivinnu øki hevur kanska serliga Òli Breckmann markera seg, men tað má metast lítið sannlíkt, at hann nú velur at fara í landsstýrið.

Nú fyrrverandi tingmaður Jóanis Nielsen hevur verið framsøgufólk hjá Fólkaflokkinum í ávísum fiskivinnumálum. Aðrastaðni á hesari síðuni kann lesast, at Jóanis Nielsen vil einki siga um, hvørt hann er ein møguligur landsstýrismaður.

Vága Fólkafloksfelag hevur ikki tikið viðgjørt málið, men hetta verður gjørt rættiliga skjótt, sigur Jákup Guttesen, formaður. Hann avvísir ikki, at felagið er áhuga í at varðveita ein landsstýrismann í oynni, men inntil nevndin hevur viðgjørt málið, hevur hann ongar viðmerkingar.

## Vilja hava

Fyri Suðuroyar Fólkafloksfelag hevur tað stóran týdning at fáa ein landsstýrismann. Tá Jørgen Niclasen í sínari tíð varð settur sum landsstýrismaður var misnøgdin stór millum fólkafloksfólk í Suðuroy um at Suðuroyggin ikki fekk umboðan.

Felagið í Suðuroynni hevði tó einki ímóti, at Jørgen Niclasen helt fram eftir valið 30. apríl 2002, tí mett var ikki, at neyðugt var við einari útskifting og hildið var, at Jørgen Niclasen gjørdi eitt munagott arbeiði.

– Vit hava ikki gjørt vart við okkum enn yvirfyri flokkinum, men teir vita, at vit vilja hava ein landsstýrismann í Suðuroynni, sigur Jacob Vestergaard, nevndarlimur í Suðuroyar Fólkafloksfelag.

Tað hevur verið sera truppult hjá Fólkaflokkin at fáa umboðan í Suðuroynni seinnu nógvu árini, og eingin suðuroyingur hevur umboðað Fólkaflokkin í landsstýrinum síðani Páll Vang frá 1981 til 1985 við Paula Ellefsen sum løgmanni.

Á valinum í 2002 gekk heldur ikki serliga væl hjá Fólkaflokkinum í Suðuroyar valdømi.

– Vit hava verið vónsviknir um, at vit ongan landsstýrismann fingu. Fyri Fólkaflokkin í Suðuroynni er tað sera týdningarmikið, at vit kunnu fáa umboðan í landsstýrið. Vit eru keddir um viðferðina, ið Jørgen Niclasen hevur fingið, men nú er aftur ein dagur, sigur Jacob Vestergaard.

Eftir hvat Sosialurin skilir, so var Jacob Vestergaard upp á tal, tá Fólkaflokkurin møguliga skuldi umsita almannamál í landsstýrinum.

Jacob Vestergaard dylir heldur ikki fyri, at hann er áhugaður fyri einum landsstýrissessi, og hann vil umhugsa eitt møguligt tilboð, men hann kennir einki til, at hann skal vera ein kanditatur.



*Eitt kontór stendur tómt á Fiskimálaráðnum. Bæði suðuroyingar og eysturoyingar ynskja sær ein av teirra í heita sessin.*

## Leggja billett inn

Steintór Jacobsen er formaður fyri Eysturoyar Fólkafloksfelag. Hann upplýsir, at nevndin í Eysturoyar Fólkafloksfelag enn ikki hevur havt fund um málið viðvíkjandi valið av landsstýrismanni.

Men áhugin er avgjørt til staðar hjá eysturoyingum.

– Sjálvandi hevur tað týdning fyri okkum, at vit kunna profilera okkum. Skal tað veljast útfrá øki, so liggja vit nakað nær, sigur Steintór Jacobsen.

Hann ger greitt, at teir ætla at leggja billet inn.

– Vit mangla ikki kanditatar, metir Steintór, sum tó ikki vil seta navn á nakran, tí hetta als ikki hevur verið viðgjørt enn.

## Persónur ikki stað

Fyri Fólkafloksfelagið í Havn, Havnar Framburðsfelag, er tað ikki týdningarmikið, hvaðani ein landsstýrismaður er.

– Tað mest týdningarmikla er, at persónurin er tann rætti, sigur Aage Arnoldson, formaður í Havnar Framburðsfelag.

So fyri tykkara skuld kann ein komandi landsstýrismaður vera úr Klaksvík?

– Ella úr Havn, sigur Aage Arnoldson.

Hann vil ikki gera fleiri viðmerkingar til málið, tá felagið ikki hevur viðgjørt málið enn.

Jóanis Nielsen:

# Samgongan heldur ikki

**– Sjálvur trúgvi eg ikki, at samgongan heldur fram, sigur Jóanis Nielsen, fyrrverandi tingmaður fyri Fólkaflokkin**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*Jóanis Nielsen er nú fyrrverandi tingmaður. Sjálvur roknar hann ikki við, at samgongan kann yvirliva hetta.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Jóanis Nielsen kann nú kalla seg fyrrverandi tingmann fyri Fólkaflokkin. Við 111 persónligum atkvøðum gjørdist Jóanis Nielsen varamaður hjá Jørgen Niclasen á Føroya Løgtingi við valið 30. apríl. Løgtingssessurin var tó ikki fremmandur fyri Jóanis Nielsen.

Síðani 14. desember 1998 hevur hann verið varamaður fyri Jørgen Niclasen, tí hann við valið í 1998 við 91 atkvøðum fór framvið Svend Aage Ellefsen og gjørdist varamaður hjá Jørgen Niclasen.

Tá John Petersen fór úr landsstýrinum og Jørgen Niclasen kom í hansara stað stutt eftir, at nýtt landsstýri varð skipað, so varð kósin sett fyri Jóanis Nielsen, sum altso hesuferð kláraði at sita akkurát fýra ár og ein mánað í Løgtinginum.

Tá landsstýrismaður fer aftur í tingsess sín, so fer varamaðurin úr tinginum beinanvegin. Jørgen Niclasen tekur yvir nevndarsessin hjá Jóanis Nielsen í Trivnaðarnevndini.

Jóanis Nielsen fær ongar bíðipengar sum tingmaður. Løgtingsmenn fáa lønina útgoldna ein mánað fram, og Jóanis Nielsen fær onga løn fyri februar mánað. Orsøkin til, at Jóanis Nielsen fær løn í januar er tann, at løgtingsmenn ikki fáa løn frá tí degi, teir eru valdir, men næsta mánaði at rokna.

## Lærari

Jóanis Nielsen fer tó ikki at ganga arbeiðsleysur, tí boð eru eftir honum fleiri staðni.

Hann er í farloyvi sum fulltrúi í Almannamálaráðnum, og hann vendir eftir ætlan aftur til starvið, sum inniber, at Páll á Reynatúgvu verður nýggi stjórin hjá fyrrverandi tingmanninum.

Jóanis Nielsen er útbúgvin lærari og hevur arbeitt innan bankaheimin. Júst læraraútbúgvingina fær hann brúk fyri, tí hesa næstu vikuna ella so skal vera lærari á skúlanum á Giljanesi.

– Teir høvdu tørv á einum lærari, so eg fari at vera har í øllum førum hesa vikuna, sigur Jóanis Nielsen.

Nú hann fer úr tinginum, so er Jóanis Nielsen avkláraður við støðuna.

– Hetta eru umstøðurnar hjá tingmonnum og serliga hjá varamonnum. Tú veitst ongantíð, hvat hendir í morgin, sigur Jóanis Nielsen.

## Trupult hjá samgonguni

Vónirnar til, at samgongan heldur fram, eru ikki serliga góðar hjá fyrrverandi tingmanninum.

– Sjálvur trúgvi eg ikki, at samgongan heldur fram, sigur Jóanis Nielsen.

Hann metir, at stevið nú er vorðið so mikið vánaligt, at tað verður torført at klára at arbeiða uttanum.

– Hevði tað verið øvugt, og Fólkaflokkurin atkvøddi fyri einum misáliti fyri ein landsstýrismanni hjá Tjóðveldisflokkinum, so hevði verið liðugt við samgonguni í somu løtu, sigur Jóanis Nielsen.

Jóanis Nielsen vil ikki siga, hvørt hann er sinnaður ella áhugaður at gerast nýggi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fyri Fólkaflokkin.



# Vantandi uppmerking í Vágatunlinum

**Í samband við vanlukkuna, sum hendi í Vágatunlinum mánakvøldið, hava fólk gjørt vart við, at alt ov vánalig uppmerking hevur verið bæði uttan fyri og inni í tunlinum, meðan arbeitt hevur verið**

TUNNILSTRYGD
*Edvard Joensen*



*Arbeitt hevur inni í tunlinum, samstundis sum loyvt hevur verið at koyrt ígjøgnum. Tað er nú av trygdarávum broytt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vágar:** Hóast eingin ivi er um, at ferðin var alt ov høg, tá vanlukkan í Vágatunlinum hendi mánakvøldið, eru fleiri fólk, sum samsvarandi vísa á, at uppmerkingin í tunlinum hevur verið sera ónøktandi, meðan arbeitt hevur verið.

Fólk, sum koyrdu gjøgnum Vágatunnilin fríggjakvøldið í seinastu viku, vita at siga, at arbeitt varð við tveimum stórum bilum inni í tunlinum, men ikki eitt einasta skelti var nakrastaðni, sum segði frá hesum. Hvørki uttan fyri ella inni í sjálvum tunlinum.

Hermann Lindberg hjá NCC váttar, at merkingin hevur ikki verið nøktandi. Hetta ávísa fríggjakvøldið, nevnt er, var einki skelti uppi, sigur hann. Og sama hevu verið inni í tunlinum, meðan arbeitt hevur verið.

NCC hevur havt útvarpslýsingar, sum hava sagt frá, at arbeitt verður í tunlinum. Umframt eru stóru bilarnir útgjørdir við arbeiðsljósum, sum í stórari fjarstøðu ávara um, at arbeitt verður, og skuldi tað verið nóg mikið til at ávara fólk, sum koyra við vanligari ferð, metir hann.

At eingin skelting er inni í tunlinum kemst av, sigur Hermann Lindberg, at tað krevjast so nógv skelti, og at tað tekur so langa tíð at flyta tey, so hvørt arbeiðsbilarnir veðra fluttir stað úr stað.

–Tað skulu eini fýra skelti til hvørjumegin arbeiðsplássið, og tað tekur helst longri tíð bara at flyta skeltini, enn tað ger at gera sjálvt arbeiðið á staðnum, sigur hann.

Men ein rættiliga stórur trupulleiki er tað eisini, vísir Hermann Lindberg á, at fólk virða ikki skeltingina, sum er. Tað er rættiliga ofta komið fyri, at fólk halda hánt um eitt skelti, sum sett er upp, og bara koyra, hóast tey við skeltingini verða biðin um tat steðga ella heilt at halda seg burtur, sigur hann.

Eftir tað, sum hendi mánakvøldið, er gjørt av at steingja tunnilin fyri ferðslu, meðan arbeitt verður. Tað vil siga frá klokkan sjey á kvøldi, til klokkan seks um morgunin. Frá mánakvøldi til leygarmorgun tað, sum eftir er av januar mánað. Tó er tað soleiðis, at hvønn heilan tíma verða bilar sleptir ígjøgnum. Vakt, sum syrgir fyri, at eingin fer ígjøgnum uttan til ta ásettu tíðina, stendur við tunnilsmunnarnar.

# Menninir á myndini leyslatnir

**Menninir, sum eru á myndini, ið stóð á forsíðuni á Sosialinum týsdagin, eru ikki partar av málinum um narkotikasmuglingum flogvøllin**

NARKOSMUGLING
*Edvard Joensen*

Menninir á myndini omanfyri, eru ikki undir illgruna fyri at royna at flyta narkotika til Føroya.

Løgreglan í Havn váttar, at menninir hava verið til avhoyringar og eru leyslatnir uttan ákæru.

Menninir á myndini vóru í sama ferðalag, sum ein persónur, sum hevði narkotika í viðførinum, tá hann kom við flogfari til Føroya mánadagin, og tí tiknir við til avhoyringar hjá løgregluni.



*Menninir, sum á myndini av løgregluni verða fluttir av flogvøllinum til Havnar, eru leyslatnir uttan ákæru og hava einki við umrødda mál um narkotikasmugling at gera, váttar løgreglan í Havn*

# Umvæla Norðskála Kirkju



**Kirkjan við Norðskála verður pussað og tett, eins og hurðar og vindeygu eisini verða skift**

UMVÆLING

Tað verður í hesum døgum arbeitt upp á kirkjuna við Norðskála. Leki verður tettur, og hurðar og vindeygu skift út.

Emil Olsen, sóknarprestur, sigur, at arbeitt verður við at tetta onkrar lekar í kirkjuni. Pussið er tikið av, og tett verður, áðrenn pussað verður aftur av nýggjum. Síðan skal kirkjan málast.

Norðskála Kirkja hevur plastikkvindeygu og -hurðar. Tó eru høvuðsdyrnar av træi, sigur restur. Plastikkið varð sett í, tá bygt varð upp í kirkjuna í 1978.

– Nú verður ikki hildið, at tað er nóg gott at hava plastik í slíkum bygningum sum eini kirkju, heldur Emil Olsen, so vindeygu og hurðar verða nú øll skift og træ sett í aftur, sigur hann.

**ej**